Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Súni Olsen til Hollands

Beint sum fótbóltslandskappingin er lokin, fer 19 ára gamli gøtumaðurin til Hollands

Beint sum føroyska kappingin endar, fer Súni Olsen til Hollands at royna fótbóltsevni síni

JÁKUP MØRK

Tað var meðan føroyska landsliðið fyrst í hesum mánaðinum royndi seg á Svangaskarði, at Súni Olsen var á royndarvenjing hjá hollendska FC Zwolle, sum spælir í næstbestu hollendsku deildini.

Sum skiltist á Súna ta ferðina, so hevði tað gingist honum rættuliga væl, og sjálvur roknaði hann tá við, at onkur sáttmáli kundi spyrjast burturúr.

Dreymurin veruleiki

Hetta tykist nú at vera veruleiki, og við hesum er ein partur av dreyminum hjá unga gøtumanninum gingin út.

Tá vit fingu orðið á hann mánakvøldið, var tað sjálvandi ein fegin unglingi, sum vit prátaðu við, men hinvegin var eisini merkisvert, hvussu róligur hann var um alt hetta.

Sjálvur heldur hann, at tað síðani venjingarleguna hjá GÍ hevur verið roknað við, at okkurt fór at henda.

Geir Lange, sum í fleiri ár hevur rætt GÍ eina hjálpandi hond í fyrireikingunum av venjingarlegu teirra, hevur seinastu 18 árini starvast sum sonevndur talentspeidari. Geir segði tá frá, at hann so avgjørt helt møguleikar vera í fótbóltsevnunum hjá Súna, og síðani hava Geir og mammubeiggi Súna, Pauli Jarnskor, arbeitt við málinum. Eitt arbeiði, sum í fyrsta umfari var liðugt mánakvøldið, tá GÍ og hollendska felagið samdust um treytirnar fyri spæleraskiftið..

Beint sum føroyska kappingin endar, fer Súni Olsen til Hollands at royna fótbóltsevni síni

Vónandi verður tað heldur ikki nakar trupulleiki hjá Súna at finna seg til rættis í nýggja fótbóltsumhvørvinum. Gongst nóg skjótt við hesum, er einki at ivast í, at vit innan stutta tíð hava enn eitt nýtt andlit á fótbóltslandsliði okkara. Eitt andlit, sum mong halda longu skuldi verið í hópinum hjá Allani Simonsen.

Finna seg til rættis

Fyrstu tíðina í felagnum fer Súni ivaleyst at nýta til at finna seg til rættis í nýggja umhvørvinum.

- Tá eg var og royndarvandi, búi eg hjá einum húski har niðri, og har skal eg so búgva fyrstu tíðina. Í desember mánaði fái eg so væntandi egna íbúð, sigur ungi gøtumaðurin.

Sostatt er líkt til, at døgurðin stendur á borðinum fyrstu tíðina í øllum førum, men eru tey heima heilt trygg við at lata sonin fara uttanlands at royna seg.

- Ja, eg haldi meg kunna siga, at øll heima hjá okkum eru sera spent um hetta. Ikki minst pápi mín, sum alla tíðina hevur eggjað mær til, so frá teirra síðu er als eingin trupulleiki,sigur Súni at enda.

Súni hevur stórar møguleikar

Geir de Lange, sum hevur hjálpt Súna við at sleppa til Hollands, sær stórar møguleikar í føroyska leikaranum

JÁKUP MØRK

Seinastu sjey árini hevur Geir de Lange verið maðurin, sum hevur hjálpt GÍ við fyrireikingum, tá felagið hevur verið á árligu venjingarleguni í Danmark.

Sostatt er við árunum ícomið eitt gott samband við mannin. Kanska skuldi heldur staðið vinarlag, tí sjálvur letur Geir ongan iva vera um, at hann heldur nógv av GÍ. Bæði sum felag og teimum einstaklingum, sum eru í felagnum.

Drúgvar royndir

Eitt av teimum geramálum, sum Geir eisini tekst við, er at hann seinastu 18 árini hevur verið talentspeidari. T.v.s. leitar eftir ungum evnaríkum leikarum, sum kunnu gerast áhugaverdir hjá ymsum europeiskum feløgum.

- Eg havi fingið nógvar royndir hesi árini, og tá eg í summar sá Súna spæla, var eg ikki í iva um, at talan her var um ein sera evnaríkan leikara.

- Hann er tó heldur í eldra lagi í so máta, hóast hann bert er 19 ár. Í Hollandi og Belgia er vanligt, at sáttmáli verður gjørdur við leikarar um 15 ára aldur, tí feløgini tá hava nógv størri møguleikar at menna teir.

Sum dømi um heilt leikarar, sum Geir hevur sent uttanlands, nevnir hann svenska Pär Zatterberg, sum mong munnu meta sum ein hin fremsta svenska leikaran í løtuni. Hesin fór 15 ára gamal til belgiska Anderlecht, har hann í fleiri ár taldist millum bestu leikararnar, áðrenn hann í summar skifti til grikska Olympiakos.

Betri møguleik í Hollandi

Geir ivast tó ikki í, at Súni hevur góðar møguleikar at menna seg heilt nógv í Hollandi.

- Tað hevur verið skrivað um, at t.d. Rosenborg eisini hevði áhuga í honum, men her haldi eg, at menningarmøguleikarnir í Hollandi eru nógv størri. Hetta av teirri einføldu orsøk, at her fær hann spælt á rættuligum grasi í 11 mánaðir, ístaðin fyri einar seks mánaðir, sum talan er um í Noreg.

Kanska mest spennandi parturin av fótbóltsævintýrinum hjá Súna er agenturin, sum hevur fingið sáttmálan í lag. Talan er hollendska Henk van Ginger, sum hevur felagið, World Soccerconsult. Hesin er umboð hjá nógvum kendum leikarum, og millum annað hevur hann staðið fyri handlunum av Jaap Stam, Raimond Van Der Gouw og Sami Hypia.

- Hetta haldi eg vera av alstórum týdningi, tí við hesum standa so at siga allir møguleikar opnir fyri Súna, um so er, at evnini og viljin eru nóg stór. Og at viljin er í lagi ivist eg ikki í, leggur Geir de Lange afturat.

GÍ fær stórar møguleikar

Umframt týdningin, sum hetta kann hava fyri Súna, leggur Geir eisini dent á, at fyri GÍ kann hetta samstarv verða av alstórum týdningi.

- Hetta gevur heilt avgjørt møguleikar til felagið. Bæði tí teir leikarar, sum eru í felagnum, fáa meira at stremba eftir, men eisini, tí teir á henda hátt kunnu draga fleiri evnaríkar leikarar til felagið.

Hvørt hetta seinna fer at gerast møguleiki, kann bert framtíðin vísa, men fyri føroyskan fótbólt sum heild er at vóna, at hetta kann seta enn meira ferð á ta menning, sum hevur verið so eydkend seinnu árini.

At umheimurin hevur fingið eyguni upp fyri føroyskum fótbólti, tykist so als eingin ivi at vera um.



Geir de Lange, sum var millum áskoðararnar í Gøtu sunnudagin, heldur at allir møguleikar standa opnir fyri Súna

Mynd: Jonhard Hammer

B71 tók argjamenn á málstrikuni

3. deild: *Vónbrotið í AB var stórt, tá teir ikki megnaðu at halda tørn ímóti B36. B71 sigurin í Klaksvík bar við sær, at sandoyingar fyri fyrstu ferð spæla um eitt pláss í næstbestu deildini, og at KÍ flutti niður*

Vinnarar av triðju deild hjá monnum 2000, Skála

Mynd: Sveinur Tróndarson

Tað var ikki frítt, at dramatikkur var í luftini, tá átjanda og síðsta umferið var á skránni aftaná døgurða leygardagin. Longu frammanundan var tað greitt, at Skáli hevði vunnið deildina. Einki avgjørt um, hvør skuldi vinna silvur og bronsu, hvør skuldi spæla um eitt pláss í næstbestu deildini, hvør skuldi flyta beinleiðis niður, og hvør skal spæla um eitt pláss í deildini.

Vinnarin

Á Skála vóru teir spentir uppá, um tvørámenn, sum hesa seinastu tíðina hava havt ilt við at manna lið, fóru at møta upp. TB møtti upp, og teir løgdu rygg til 8–0 tap. Fyrsta hálva tíman bendi ikki so nógv á, at talan fór at verða um stórsigur. Pauli Hansen, sum hevur verið nógv skaddur í ár, setti hol á beinanvegin, men so gekk ein góð løta. Skáli hevði bóltin nógv mest, teir høvdu fleiri møguleikar, men inntil í 28. minutti megnaði Jónas Johannesen í TB málinum at halda tætt.

Bogi Gregersen til 2–0, og hann gjørdist dagsins maður bæði so og so. Toppskjúttin í fjør (eisini hann hevur verið nógv burtur frá í ár, tí hann hevur verið skaddur) skoraði fýra mál, áðrenn hann í 77. minutti noyddist av vøllinum. Tá fekk hann fyri aðru ferð gula kortið, og so kom ostaskorpan úr lummanum.

Í næstsíðsta minuttinum varð gula kortið fyri aðru ferð stungið fyri næsarnar á Kristiani Olsen hjá TB, og so noyddist hann undir brúsu.

Eftir dystarlok handaði formaðurin í kappingarnevndini hjá FSF, Bærge B. Hansen, skálamonnum steypið, sum teir eisini vunnu í fyrraárið, og gullkrónurnar.

Stóri taparin

Undan kappingarbyrjan duldu teir í AB ikki, at málið hjá teimum var bara at steðga eitt ár í 3. deild. AB vildi vera triðji møguleikin í høvuðsstaðnum. Teir vóru væl við í oddastríðnum, men tað var sera kostnaðarmikið hjá teimum, at teir taptu báðar dystirnar ímóti sandoyingum. B71 vann 4–2 á Argjum og 3–2 á Sandi.

AB hevði undan leygardegnum møguleika at vinna silvurkrónurnar og rættin at spæla um eitt pláss í næstbestu deildini. Teir mistu uppflytingarmøguleikan, og teir fingu hvørki silvur ella bronsu.

Dysturin á Argjum minti ikki sørt á 1999 kappingarárið, tá B36 í 4. deild snýtti AB. Heimaliðið á Argjum noyddist síðsta tíman at spæla við tíggju monnum. Eyðun Dalsgarð fekk gult kort í 29. minutti, og tá hann tríggjar minuttir seinni aftur sá gult, noyddist hann av vøllinum.

Hóast teir vóru undirmannaðir, so megnaðu teir á tímanum at leggja seg framum 2–1. Útjavnandi B3 málið var rættuliga heppið. Ólafur Debes fekk nakkan á hornasparksinnlegg, bóltin støkk á skinnabeinið á Regini Arge, og so hevði B36 vunnið silvurkrónur, meðan AB einki fekk og tískil stóð eftir sum stóri taparin.

Nýggjur møguleiki

Síðani sandoyingar í áttati árunum við nógvari ferð fóru úr 3. og upp í 1. deild, hava teir ikki roynt at flyta upp úr 3. deild. Næstbesta liðið hjá teimum hevur verið støðugt í ár, men tað hevur ikki verið nógv tosað um uppflyting.

B71 er framvegis 3. deildarlið, men teir hava møguleikan at flyta upp. Teir skulu spæla tveir dystir um plássið í 2. deild. Hvørjum teir skulu spæla ímóti verður avgjørt leygardagin. Tað eru tríggir møguleikar. Undan síðsta umfarinum er LÍF næstaftast. Leirvíkingar eru javnir í stigum við GÍ. Grannaliðini hava nítjan stig í part, men HB, sum hevur tjúgu stig, er eisini í vanda.

LÍF skal leygardagin spæla í Gundadali ímóti B36. Tað man kennast ivaleysa torført hjá leirvíkingum, men tað verður ikki minni torført hjá HB og GÍ, sum skulu spæla ávikavíst á útivølli ímóti ÍF og á heimavølli ímóti KÍ.

B71 vann leygardagin 2–0 í Klaksvík. Heimaliðið hevði í royndini at bjarga liðnum mannað seg væl, so tað var strevið hjá B71, men teir megnaðu setningin.

Áhugavert er at staðfesta, at tað var avgerðin, um at innanhýsis mál og mál skorað á útivølli ikki hava nakað at siga, sum bar við sær, at B36 fekk silvur og B71 bronsu.

Bæði liðini endaðu á 33 stigum, og tey vunnu hvønn sín innanhýsis dyst. B71 vann 2–1 í Gundadali, og B36 vann 1–0 á Sandi. Høvdu málini á útivølli vigað, tá tað stendur á jøvnum í innanhýsis stigum og málum, so hevði B71 vunnið silvur og B36 bronsu. Nú var tað samlaði málmunurin, sum var avgerandi. B36 hevur málmunin +22, og B71 hevur málmunin +15.

KÍ hevur ikki heilt mist vónina um at spæla í 3. deild komandi ár. GÍ vann 4. deild, og teir flyta upp í 3. deild. Um tað fer at vilja so illa til, at GÍ noyðist niður úr 2. deild, so fer teirra lið úr 3. deild, og so sleppur KÍ frá at flyta niður. Hin møguleikin hjá KÍ er, at 4. deildarliðið hjá teimum flytir upp. Teir endaðu á øðrum plássi í 4. deild. Tað vil siga, at teir fáa ein møguleika at spæla um eit pláss í 3. deild. Tað verður ímóti FS Vágum, sum endaði næstaftast í 3. deild.

Vónbrotini

Vágbingar vunnu sannfærandi ímóti B68. Harvið endaði VB á fimta plássinum. Eftir átjanda umfarið eru teir bara tvey stig frá bronsukrónunum og møguleikanum at spæla um eitt pláss í næstbestu deildini. Tí kann ikki sigast annað, enn at VB eisini í 3. deild hevur havt eitt gott kappingarár.

Sammett við undanfarnu árini hava B68 og ÍF staðið seg illa. Serliga hjá B68 er tað merkisvert, at eykamenninir hjá besta liðnum, sum fram til síðsta sunnudag vóru við í FM stríðnum, hava havt afturpartin í vatnskorpuni í 3. deild. Tá B68 leygardagin tapti í Vági, noyddist venjarin, Kjartan Nesá, at spæla úti á vøllinum. Tá Jóhan Dávur Højgaard ikki hevur verið heima, hevur Kjartan verið í málinum. Kjartan Nesá hevur ofta verið seinasti skansin hjá toftamonnum. Nú kom hann á málskjúttaralistan – ivaleyst fyri fyrstu ferð nakrantíð!

Vágamenn ætlaðu sær at gera seg galdandi í 1. deild og ivaleyst eisini í 3. deild. Tað hevur ikki gingið væl í 1. deild, og tað hevur gingið illa í 3. deild. Hóast átjanda umferið er farið afturum, so er framvegis møguleiki fyri, at FS Vágar flytir niður úr 3. deild. Møguleikin er nevndur omanfyri.

Endi

Og so var kappingarárið í 3. deild liðugt fyri í ár. Vit hava roynt at fylgt við, og vit halda, at tað hevur eydnast so toluliga. Einar tvær ferðir hava vit ikki megnað at umrøtt umferið í somu viku, sum tað varð spælt. Tað harmast vit um, samstundis sum vit gleðast um tey, ið hava givið okkum eitt herðaklapp fyri at hava verið við til at gera kappingina eitt lið ikki møtir til fleiri dystir, er ivaleyst ein spurningur, sum fer at verða tikin upp, tá feløgini og Fótbóltssambandið fara at eftirmeta kappingina.

H

Úrslit, 18. umfar

ÍF–FS Vágar 4–1 (1–0)
1–0: Árni Petersen 40.
2–0: Jákup Baldvinsson 58.
3–0: Jákup Baldvinsson 62.
3–1: Elfinn Ørvarodd 70.
4–1: Jákup Baldvinsson 74.

VB–B68 4–1

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa nøvnini á málskjúttunum

AB–B36 2–2 (1–1)
0–1: Petur M. Johansen 22.
1–1: Sigurd Vatnhamar 36.
2–1: Sonny Djurhuus 61.
2–2: Regin Arge 88.
Reytt kort: Eyðun Dalsgarð, AB, 32. (tvey gul)

Skáli–TB 8–0 (5–0)
1–0: Pauli Hansen 6.
2–0: Bogi Gregersen 28.
3–0: Bogi Gregersen 34.
4–0: Marius Joensen 37.
5–0: Bogi Gregersen 42.
6–0: Bogi Gregersen 54.
7–0: Hans Kristian Djurhuus 85.
8–0: Arnhold Berg 87.
Reytt kort: Bogi Gregersen, Skáli, 77. (tvey gul), Kristian Olsen, 89. (tvey gul)

KÍ–B71 0–2 (0–1)
0–1: Julian Thomsen
0–2: Páll á Reynatúgvu

Yviirlit yvir allar málskjúttarnar í triðju deild verður í blaðnum í komandi viku.

Endaliga støðan, 3. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Skála	18	12	-	2	-	4	70	35	35	38
2	B36	18	10	-	3	-	5	49	26	23	33
3	B71	18	11	-	0	-	7	59	46	13	33
4	AB	18	10	-	2	-	6	77	44	33	32
5	VB	18	10	-	1	-	7	52	46	6	31
6	TB	18	6	-	2	-	10	47	56	-9	20
7	B68	18	5	-	5	-	8	43	45	-2	20
8	ÍF	18	6	-	2	-	10	46	55	-9	20
9	FS Vágar	18	5	-	2	-	11	48	68	-20	17
10	KÍ	18	5	-	1	-	12	42	112	-70	16